# Reglugerð fyri Aktións- og Upplýsingargrunnin

**Endamál:** At stuðla limum felagsins undir aktión/verkfalli.Harumframt at veita limum felagsins fíggjarligan stuðul til at granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

**Nevndin:** Í nevndini fyri grunnin eru 3 limir. 1 frá nevndini í Pedagogfelagnum og 2 álitisfólk.

**Inntøkur:** 10 % av hvørjum limagjaldi + rentur.
50.000 kr. verða settar í grunnin sum stovnspeningur.

**Veitan úr:** Stuðul kann søkjast úr grunninum við skrivligari umsókn til nevndina, sambært ásettu treytum og mannagongdum, sum nevndin fyri grunnin hevur samtykt. Stovnspeningurin + 90 % av inngjaldinum skal bert kunna nýtast til at stuðla limum felagsins undir verkfalli/aktión. 10% av inngjaldinum kann latast til umsøkjarar, ið vilja granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

**Roknskaparárár:** Roknskaparár grunsins er álmanakkaárið.

**Avtøka:** Avtøka av grunninum fer fram sum lógarbroyting(hjá) Pedagogfelagnum. Aðalfundurin avger tá, hvat peningurin skal nýtast til.

Nevndin í Pedagogfelagnum

Soleiðis góðkent á aðalfundinum 27/4-85.
Broytt á aðalfundinum 08/04-2000, vegna at umboðsráðið verður strikað.
Broytt á aðalfundinum 16/3-2013.